# BØNARLØTAN

**Februar** **2017** **32. árg.**

## *1. Mikudagur* — *Esaias 26.1-21*



*Fólkið býr í smáum bygdum*




*Mixtecfólk hjálpa til at umseta Skriftirnar*



*Vit hava eisini skrivað nógvar søgu- og lesibøkur at læra fólkið at lesa sítt egna mál*

## MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
## Inga McKendry

Í feb. eru eg og Sue við Mixtec-toyminum á skeiði at læra meir um landafrøði og mentan í Ísrael. Skeiðið hjálpir okkum at skilja og týða Skriftirnar. Hinar tvær vikurnar verða nýttar til umsetingararbeiði.

## KRINGVARPIÐ

5. febr. Útvarpsmøti, Elim, Søldarfjørður
12. mars Sjónvarpsandakt, Jákup Hansen
18. mars Sjónvarpsandakt, Jákup Hansen
26. mars Sjónvarpsmøti, Siloa, Fuglafjørður

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Føroysk møti í Jútlandi

4. febr. kl. 19 í Esbjerg, Ådalsparken 33
5. febr. kl. 17 í Vejle, Frelsunarherhølið, Staldgårdsgade 4.
11. febr. kl. 19 í Aalborg, Bethaniakirkjan, Dag Hammerskjøldsgade 2A

**2. Hósdagur** **Sálmur 66**



## DANMARK, Hirtshals, Malta
## Anna og Hans Djurhuus

3. - 5. feb. hava vit mansvikuskifti. Einar Vang, Hans Joensen og Svein í Prestgarði luttaka. 18. mars verður kvinnudagur í Malta. Tripletrioin í Ebenezer syngur og vitjar kvinnurnar. Tilmelding áðrenn 11. mars. Vit luttaka á møtinum fyri føroyingar í Ålborg 11. febr.

## SVEIS, Nyon, Westlake Church
## Jeanette og Solomon Magura, Reuben 3, Micah 3

3. - 5. febr. fara vit árliga vikuskiftistúrin við samkomuni á legu uppi í fjøllunum. Í ár er fullteknað, og vit gleða okkum. Biðið fyri leguni, at samfelagið verður styrkt, og at vit verða uppbygd í trúnni.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 13, Rebekka 11, Hanna 8**

Fyrst í febr. kemur beiggi Moniku við familju at vitja. Tað er hálvtannað ár, síðani vit sóu nakran í familjuni, so tað gleða vit okkum nógv til. Í seinnu hálvu av febr. kemur Jógvan Júst at rættlesa alla 2. Mósebók saman við Tim og nøkrum palawano-fólkum. Tá tað er liðugt, og Tim hevur gjøgnumgingið møguligar rættingar, er 2. Mós. endaliga liðug.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Anna fær hjálp alt samdøgrið, meðan Dubby er í Senegal frá 8. febr. til 8 mars. Ein ungur maður fer við at hjálpa Dubby at leggja Orð Guds á sereer og saafi máli á alnótina. Teir fara at arbeiða saman við pastorinum Musa. Biðið um tryggleika á ferðini.



**DANMARK**
**Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein,**
**Sigrid 9, Andreas 7, Kristina 5**

Eftir jólafrítíðina og próvtøkurnar í jan. eru tey lesandi farin undir enn eitt semestur. Hetta er eisini tíðin, tá nakrir nýggir útisetar flyta til Keypmannahavnar at byrja hægri lestur. Okkum tørvar vísdóm at vera teimum til andaligan stuðul og vegleiðing.



**NTM Føroyar**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 6, Tabita 3, Debora 1**

Um undirtøka verður, fara vit á ungdómsráðstevnuna Reach 28. - 30. apríl í Onglandi. Áhugað melda til á ntm@mail.fo áðrenn 1. mars. Ung ímillum 16 og 30 ár kunnu tekna seg. Vit senda ein ferðaleiðara við. Evnið er missión við serligum denti á at náa tey, sum enn ikki hava hoyrt gleðiboðskapin.



**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 9, Svend 8, Terji 4, Petra 3**

Í Undirhúsinum í Hvalba savnast 10-20 mans regluliga. Vit hugsa um at víðka arbeiðið til eitt evangeliskt møti eina ferð um mánaðin vetrarhálvuna. Vit vitja Sandoynna við evangeliinum fyrru hálvu av febr. Vit luttaka eisini saman við Svenningi av Lofti á møtirøðini í Dansifrøi 25. - 26. febr.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

**KANADA, Good Seed International**
**Judith og Allan Ellingsgaard**
**Benjamin 12, James 10, Micha David 6**



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Frá 8. febr. til síðst í mars verða vit í Filipsoyggjum at hjálpa leiðsluni at broyta bygnaðin hjá NTM har og at hjálpa trúboðarum í tænastuni. Eg skal eisini hava fleiri fundir við filipinsku deildina hjá NTM um samstarv teirra við NTM globalt, fari at tala í samkomum og vitja nakrar ættarbólkar.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Árliga missiónsstevnan verður frá 25. febr. til 5.mars. Endamálið er at stuðla, vegleiða og eggja til missión og tænastu við nýggjari megi.

**USA, Nebraska, New Tribes Mission**
**Rachel og Peter Hansen**
**Steffan 17, Caleb 14**

6. - 8. febr. skal eg leiða árliga NTM trygdarnevndarfundin. M.a. hugsa vit nógv um umstøðurnar í Venesuela. Biðið, at Karl aftur kann gleðast í Harranum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Agnas 14, Boas 9**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech, Jan 14**

## *6. Mánadagur* *Esaias 28.1-29*



**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

Næmingarnir tæna nú í ymiskum samkomum í 10 dagar, har teir m.a. hjálpa til at bera gleðiboðskapin út í samfelagið. Í febr. hava vit serstaka undirvísing í eina viku fyri teimum, sum hugsa um at fara út sum trúboðarar. Dentur verður lagdur á kall, tvørmentan og trúboðan.

## *7. Týsdagur* *1. Kor. 15.1-19*



**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi**
**Carol og Poul Joensen**
**Jonathan Daniel 16 Ísak 14**

Eg fari til Sorimi 24. febr. - 2. apríl at vitja samkomuna og hava møtir, men serliga at halda á at umseta Bíbliuna. Biðið, at eg fái nógv burturúr og verði teimum trúgvandi til uppbygging.

⋆ Í dag fyllir Eli Joensen 12 ár.

## *8. Mikudagur* *Esaias 29.1-24*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Joy 14, Adonia 8**

Í jan. og febr. arbeiði eg við missión á alntótini og trúarverju. Áhugað kunnu gerast limir í Facebook bólkinum „Missión Johannesen Familjan“, har tænastu- og bønarbrøv javnan verða løgd út. Biðið fyri Adoniu, sum ofta hevur tað strævið.

## *9. Hósdagur* *Sálmur 67.1-68,12*



**DANMARK, Keypmannahavn**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit biðja Harran um hjálp, sum hildið verður á í 2017 at vitja á Ríkissjúkrahúsinum, Sjúklingahotellinum og øðrum støðum. Jú fleiri fólk í Føroyum biðja og siga frá, jú betur kann hetta arbeiðið samskipast.
berghamar@kristnastova.dk



**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Hannah 17, Eva 16,**
**Miriam Joy 13, Noah 10**

## *10. Fríggjadagur* *1. Kor. 15.20-38*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen**
**Natan 13**

NTM- skúlin í Onglandi hevur leingi umhugsað at skifta frá dýru oljuhitaskipanini til hita frá biomassaketlum. Vit takka Harranum, at hetta nú er gjørligt. Harumframt brúkar skúlin eisini sólorku. Øll orkan verður sostatt grøn, og tað hjálpir fíggjarliga.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

**OM FØROYAR**
**Anita og Oddmar Tausen**

## *11. Leygardagur* *Esaias 30.1-19*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Nøkur einstøk ungfólk koma á møti, hóast familjan ikki er knýtt at samkomuni. Hesi hava kristna familjubakgrund. Vit gleðast, at tey vilja savnast við okkum trúgvandi. Biðið, at tey kenna seg heima saman við okkum, og at tey taka eina greiða støðu fyri Harran.

**DANMARK, Brejning**
**Jan og Anne Zachariassen**

## *12. Sunnudagur* *1.Kor. 15.39-58*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 10, Rebekah 8, Lydia 6**

Vit fegnast um, at bíbliuumsetingin nú er tøk á sorani kurdiskum máli. Vit vóna, at útgávan gongur væl, og at ein app skjótt verður tøk. Orð Guds broytir lív; biðið tí, at mong lesa Orðið og koma at kenna Jesus.

## *13. Mánadagur* *Esaias 30.20-33*



**RUSSLAND, Moskva**
**Guðrun og Ivor Tutty**
**Sonja 17, Timothy 17, Karina 15**

Biðið fyri ymisku tiltøkunum og missiónsferðunum, at Harrin kallar menniskju at koma at virka í Russlandi. Biðið um varðveitslu, nú vit sum familja komandi mánaðirnar skulu ferðast bæði saman og hvør sær.





## GRØNLAND, Nuuk
## Hans Sivertsen

7. jan. andaðist Jonna Sivertsen, 77 ára gomul. 47 ár eru liðin síðan Jonna og Hans fluttu til Grønlands sum trúboðarar. Jonna gjørdi eitt stórt arbeiði í samkomuni og á legunum. Harumframt undirvísti hon eisini hjúnum og kvinnum heima, har hon hevði nógvar bíbliutímar. Saknurin hjá Hans, familjuni, samkomuni og nógvum grønlendingum verður stórur.

## GRØNLAND, Qasigiannguit
## Solveig og Daniel Kinda



Tað eydnaðist tíverri ikki pastori okkara Fred frá Uganda at fáa innfararloyvi at vitja okkum í USA á hesum sinni. Vit fara ætlandi aftur til Grønlands í mars. Vit leita framvegis eftir egnaðum báti at brúka til evangelisering norðan fyri Qasigiannguit.

## GRØNLAND
## Juvel II, Anna og Óli Steinberg

⋆ Í dag fyllir Aron Joensen 5 ár.

## *15. Mikudagur* *Esaias 31.1-9*



**GRØNLAND, Tasiilaq**
**Miriam og Niels Vang**

Vit hava barnamøti í bygdarhúsinum hvønn týsdag kl. 16.30 í umleið hálvanannan tíma. Á barnamøtinum er bíbilsøga, sangur, og ítriv. Millum 15 og 30 børn koma.

## *16. Hósdagur* *Sálmur 68.13-36*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**

Vikuskiftið 25. - 26. febr. skipar Svenning fyri evangeliskum fundum í hølunum hjá Dansifrøi í Havn. Biðið um vísdóm og andaliga vegleiðing at fyrireika hetta serstaka evangeliska tiltak. Sigið øðrum frá og bjóðið teimum við til fundirnar – til vitnisburð, talu, lættan sang og tónleik.

**– Lis og Zacharias Zachariassen**
**– Rutt og John í Skemmuni**

## *17. Fríggjadagur* *1. Tess. 1.1-10*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 14, Megan 12,**
**Trisha 4, Emma 0**

Fløgan hjá Regini verður nú útgivin í Italia. Bóklingurin, sum fylgir við, er umsettur til italskt. Biðið, at Harrin brúkar útgávuna at eggja trúgvandi og at leiða menniskju til Sín.

## *18. Leygardagur* *1.Mós. 25.19-34*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Grønlendska kvinnan Seria í Nanortalik, sum vit hava gott samband við, ynskir at fáa eina grønlendska bíbliu. Í síðstu viku bað hon eisini um at fáa yvirlit yvir legurnar og dato. Hon ætlar at koma á allar legurnar í summar. Eini 8 fólk úr Føroyum hava longu teknað seg at hjálpa til. Umboðsfólk okkara eru Jóanes Norðberg fyri Suðuroynna, Sólvit Nolsoe og Eli Christiansen fyri Streymoy og Vágoy, Marjun Stauss fyri Eysturoynna og Norðoyggjar. Marius Sørensen tekur sær av „Krukkuni".

★ Í dag fyllir Natan Petersen 14 ár.

## *19. Sunnudagur* *1. Tess. 2.1-20*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru glað, at toymi við ungum fólki nú aftur kunnu koma til Turkalands í stutt tíðarskeið, tí tað gevur Stephen fleiri møguleikar at undirvísa og at fara út á gøturnar við evangeliinum. Tað gongur væl við lesnaðinum hjá Anniku í Onglandi. Tað er eisini gott, at kunna vera meiri saman við børnunum har.

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen**

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen, Lele**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 8, Noah 7, Karis 3, Judah 1**



## *20. Mánadagur* *1. Mós. 26.1-17*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, NTM**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 5**

Tað gongur spakuliga framá við rygginum hjá Winu. Biðið, at Benjamin megnar arbeiðið viðvíkjandi stutttíðar tænastu og trygd. Vit fyrireika nú ferðir okkara í ár til USA og Føroyar.

## *21. Týsdagur* *1. Tess. 3.1-13*



**LANDSYNNINGSASIA**
**Christy og Dan Jacobsen**
**Justin 15, Jonathan 14, Leslie 14, Emily 6, Bethany 2**

Vit eru farin aftur í trúboðanartænastu, hesaferð í Landsynningsasia. Fimm av okkara níggju børnum eru við okkum. Sarah, ein av eldru døtrunum, hjálpir okkum eina tíð, meðan vit laga okkum til nýggju umstøðurnar. Síðani fer hon aftur at starvast á barnaheimi í býnum. Vit fara nú undir at læra málið.

## *22. Mikudagur* *1. Mós. 26.18-35*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Samverkafólk okkara á Balabac, eini hjún, fluttu fyri umleið einum ári síðani til vestursíðuna av Balabac at byrja nýtt arbeiði. Umstøðurnar har eru sera torførar, bæði tá tað snýr seg um sjúku og tryggleika. Konan stríðist við ótta. Biðið fyri teimum sum hjúnum, og at tey taka rættar avgerðir.

⋆ Í dag fyllir Benjamin Ellingsgaard 13 ár.

## 23. Hósdagur — Sálmur 69

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 12, Victoria, 10, Emma Grace 9, Jónatan 7, Marcus 4, Evita Linda 1, Joy Hanna 0**

Vit fingu eina dóttur í øllum góðum 10. jan. Hon eitur Joy Hanna. Biðið fyri barnamøtunum (escuelita biblica), vit hava leygardagar, at fleiri børn koma at hoyra gleðiboðskapin. Haldið á at biðja fyri samkomuni, sum enn er lítil, at hon kann vera ein viti, sum lýsir bjart í býi okkara Puruandiro.

**FILIPSOYGGJAR, Manila**
**Anja Nielsen (f)**

**FILIPOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 6, Leah Eve 3**

## 24. Fríggjadagur — 1. Tess. 4.1-18

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen, Kano 7, Nana 5, Louie 3**

Biðið, nú vit fyrireika okkum at fara til Japan at virka sum trúboðararar, serliga at børnini skulu klára allar broytingarnar og falla væl til.

**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 12, Micah 10, Ezra 8, Uhenya 5, Boas 3**

## *25. Leygardagur* *1. Mós. 27.1-29*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Muslimski trúarleiðarin, sum hevur verið í bygdini í eitt mannaminni, flutti í jan. aftur til heimbý sín við allari familjuni og øllum ognum sínum. Vit vita ikki, hvat hetta hevur at týða; um teir fara at senda ein annan ístaðin, ella ein ungur badiaranke maður úr bygdini kemur í hansara stað. Vit vita heldur ikki, um hetta fer at ávirka undirvísingina hjá okkum og tey, sum koma til undirvísing. Men gott er at vita, at Gud hevur fult tamarhald á støðuni.

★ Í dag fyllir Micha David Ellingsgaard 7 ár.

## *26. Sunnudagur* *1. Tess. 5.1-28*

### VENESUELA, Puerto Ayacucho
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Okkara arbeiðsfelagi Marg Jank, sum hevði havt krabbamein í mong ár, fór heim til Harran 26. des. Vit eru takksom fyri hennara lív, vitnisburð og tænastu fyri Harran í 53 ár her í Venesuela.

★ Í dag fyllir Elizabeth Niclasen 11 ár.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Selma Godtfred, Durita Olsen, Kristianna J. Heinesen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Jónvør Christiansen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, yngri, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen, Jens Allan 15, Ryan 7**
Okkum tørvar vísdóm at hjálpa tveimum ungum monnum at vaksa andaliga. Báðum tørvar eisini at finna arbeiði. Sonur okkara Andrew varð trúlovaður við Rachel Swanson fyri stuttum. Tey ætla at giftast í aug. Biðið fyri teirra og okkara ætlanum.

★ Í dag fyllir Rebekah Niclasen 9 ár.

## MÍNI BØNAREVNI

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## *28. Týsdagur* *2. Tess. 1.1-12*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 12, Aron 5, Noah Kristian 3**
Sørin vitjar í Føroyum 25. mars - 6. apríl. Hann vil fegin vitja samkomur og einstaklingar. Setið tykkum í samband við Sørin á hesi teldupostadressu: sorinjoensen@gmail.com

**BÓKATÆNASTAN**
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!




**Nýggj bók! 130 kr.**
Høvundin brúkar lívið hjá Jósefi sum dømi um, hvussu Gud leiðir børn síni gjøgnum torførar tíðir. Tað er altíð onkur okkara, sum av og á, ofta ella áhaldandi fer gjøgnum royndir og torførar tíðir við sjúku, missi ella øðrum avbjóðingum – okkum øllum tørvar at leita til Harran at fáa hjálp og biðja Hann leiða okkum ígjøgnum.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos